SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Í góðum tíðum fáa bankarnir vinningin, og tí mugu teir hjálpa til, tá ið tað gongur hin vegin*

*(Lene Espersen)*

# Ómøguligt at vinna kríggið í Afghanistan

**-Fólk eiga ikki at billa sær inn, at vit fara at vinna kríggið í Afghanistan, sigur ovastin fyri teimum bretsku herdeildunum har**

- Vit fara ikki at vinna hetta kríggið.

So avgjørdur er bretski generalurin Mark Carleton-Smith, sum er ovasti fyri teimum bretsku hermonnunum í Afghanistan. Í samrøðu við blaðið Sunday Times í gjár sigur hann, at fólk eiga ikki at hava ov góðar vónir um úrslitið av kreppuni í Afghanistan, og hann leggur afturat, at bretar eiga at gera seg til reiðar at góðtaka eina møguliga avtalu við Taliban.

- Er Taliban sinnað at seta seg við samráðingarborðið og at tingast um eina politiska semju, kann júst tað gerast tann stigið, sum kann gera enda á uppreistrinum, sigur Mark Carleton-Smith, generalur.

Sambært bretska ovastanum eigur Vesturheimurin at royna at avmarka ófriðin



*Mark Carleton-Smith saman við Gordon Brown, forsætisráðharra, tá hesin var í Afghanistan í august (Mynd: Polfoto)*

í Afghanistan so mikið, at hann ikki er nøkur hóttan ímóti umheiminum, og soleiðis at afghaanski herurin kann tryggja støðuna í landinum.

Bretland hevur 7.800 hermenn í Afghanistan.

## Eingin loysn í Bolivia

Hóast teir fundaðust í fleiri tímar í gjár, eydnaðist tað ikki Evo Morales, forseta og fýra av landsins guvernørum at loysa ta politisku kreppuna í landinum. Fundurin varð hildin fyri stongdum hurðum og var tann triði í ár.

Teir fýra guvernørarnir umboða fýra teir ríkastu landspartarnar, sum krevja størri sjálvræði. Men Evo Morales, forseti, sigur nei, og einki er sagt um, hvørt samráðingarnar halda fram ella ikki.

# Jusjtsjenko fingið nýtt andlit

**Í loyndum hevur ukrainski forsetin fingið 25 skurðviðgerðir í andlitið, eftir at hann bleiv eitraður fyri fýra árum síðani**

Dioxineiturið gjørdi, at Viktor Jusjtsjenko var næstan ikki til at kenna aftur, tí eiturið avskeplaði andlit hansara. Men við hjálp frá einum fronskum lækna, sum arbeiðir á einum sjúkrahúsi í Genéve í Sveis, hevur ukrainski forsetin fingið nýggja útsjónd og nýtt lív.

-Tað eydnaðist honum at koma hígar, uttan at nakar varnaðist tað, og inni á sjúkrahúsinum hevði hann eina lyftu fyri seg sjálvan, sigur franski læknin, Jean-Hilaire Saurat, við sjónvarpið France 2.

Tað hava verið nógvar søgur og nógvar gitingar um, hvat veruliga hendi andlitinum á Viktor Jusjtsjenko undir valstríðnum í Ukraina fyri fýra árum síðani. Summi halda, at talan var als ikki um eitran, men mong halda, at tað var russiska fregnartænastan, sum royndi at forða Jusjtsjenko at koma til valdið í Ukraina.



*Myndin vinstrumegin vísir, hvussu eiturið avskeplaði andlitið á ukrainska forsetanum. Hin myndin vísir, hvussu hann sær út nú (Myndir: AP)*

Sjálvur vil Jusjtsjenko vera við, at tað var táverandi ovastin í ukrainsku fregnartænastuni, Igor Smesjko, sum skipaði so fyri, at dioxin varð latið í matin hjá Jusjtsjenko undir einari samkomu uttan fyri Kiev tann 5. september í 2004.

Sambært teimum sveisisku læknunum, sum kannaðu ukrainska forsetan, var talan um nøkur fá milligram av dioxini, og tað var nóg mikið til at avskepla andlitið.

**STUTT SAGT**

## Valstríð um heilsumál

Eitt av teimum stóru evnunum í amerikanska forsetavalstríðnum er enn sum áður atgongdin til amerikanska heilsuverkið og ikki minst kostnaðurin. Um vikuskiftið segði Barack Obama, at fær John McCain sín vilja, fáa fleiri milliónir amerikanarar sera ilt við at útvega sær neyðuga heilsutrygd.

Fíggjarkreppan, sum hevur herja USA og fleiri onnur lond í seinastuni, hevur millum annað havt við sær, at heilsumálini hava verið burturi í valstríðnum, men Obama tók tey fram aftur í gjár. Í einari røðu í Virginia segði hann, at verður hann forseti, fer hann av tryggja fleiri amerikanarum atgongd til heilsuverkið, og tað skal gerast við at taka av skattalættan, sum Bush -stjórnin hevur veitt fólki, sum forvinna meiri enn 250.000 dollarar um árið.

Barrack Obama segði eisini, at sum forseti fer hann at virka fyri, at tryggingarfeløg og fyritøkur, sum framleiða heilivág, fáa eina ávísa fíggjarliga ábrygd í sambandi við sjúku av eitt nú hjáárinum og viðgerð.

## Hamas fyrireikar kvett

Ísraelska blaðið Ha'aretz endurgevur eitt arabiskt blað í London fyri at hava borið tíðindi um, at teir palestinsku sjálvsstýrism yndugleikarnir hava tikið stig, sum skulu forða fyri, at tann víðgongda rørslan Hamas skal taka valdið á Vestara Áarbakka.

Hamas tók valdið í Gazageiranum í fjør, og sambært Ha'aretz hevur ein talsmaður fyri Hamas váttað, at rørslan hevur í hyggju at taka valdið á Vestara Áarbakka eisini. Talsmaðurin skal hava sagt, at trygdarliðini hjá teimum palestinsku myndugleikunum sleppa ikki at kúga Hamas-viðhaldsfólk á Vestara Áarbakka leingi afturat.

-Trygdarliðini hava eftir øllum at døma einki lært av tí, sum hendi í Gaza, skal talsmaðurin hava sagt.

Viðurskiftini millum Hamas og Fatah-rørsluna hjá Mahmoud Abbas, forseta hava leingi verið spent, og egyptiskar semingsroyndir hava ikki borið frukt.